Ferðingin hjá ritum í 2009 og 2010

Bergur Olsen, Havstovan, 17.1.2011

Í 2009 setti Fuglakanningarstøðin ljósloggarar (mynd 1) á 20 ritur í St. Dímun við stuðli frá Innlendismálaráðnum (sí frágreiðingina seinasta ár). Hetta er eitt samstarv millum londini kring norður Atlantshavið, sum til samans hava sett gott 300 loggarar á ritur í 2009. Hesir loggarar savna upplýsingar um, hvar riturnar ferðast, men treytin er, at vit fáa hendur á loggararnar, so úrslitini kunnu avlesast. Arbeiðið seinasta summar var tí at fanga hesar ritur aftur. Hetta eydnaðist rættiliga væl; vit fingu 10 ritur aftur. Til samans hava vit fingið 203 loggarar aftur frá øllum londunum, sum eru við í verkætlanini.



Mynd 1. Ljósloggari

Mynd 2. Ljósloggari á ritubeini

Tvey fólk frá Fuglakanningarstøðini vóru í St. Dímun og leitaðu eftir teimum merktu ritunum. Vit sóu 16 merktar ritur og fingu sum nevnt hendur á 10 av teimum. Tær flestu sótu í teimum somu reiðrunum sum árið fyri, men av tí at tær flestu pisurnar vóru deyðar í hungri, sótu riturnar ikki so fastar á reiðrunum, sum tær annars gera, og tí vóru tær ringar at fanga.

Mynd 3. Ritubergið í St. Dímun, har loggararnir vórðu settir á riturnar.

Loggararnir vórðu tiknir av ritunum seinasta summar (2010), og síðani vórðu riturnar sleptar av stað aftur. Datafílurnar vórðu síðani lisnir úr loggarunum og sendar til Norra, har tær vórðu viðgjørdir saman við hinum 193 loggarunum í verkætlanini. Hesi úrslit eru síðani send til Danmarkar, har ein samanbering verður gjørd ímillum tey ymisku fuglabergini, sum eru við í verkætlanini. Ein felags vísindalig grein verður skrivað í vár.

Tey fyrstu úrlsitini eru komin, og her sæst, hvar hvør einstøk rita hevur verið næstan hvønn dag allan veturin. Neyvleikin er o.u. 150 km, og tað er ríkiliga neyvt til at vísa ferðingina úti á opnum havi. Sum sæst á mynd 5-7, so fór rita nr.1 fyrst yvir til Canada, síðani til New Foundland, og haðani fór hon fyrst til Írland og so til Ísland, áðrenn hon kom aftur til Føroyar at reiðrast.

Fig. 4. Ritur.



Mynd 5. Ferðin hjá ritu nr.1 á heysti 2009.



Mynd 6. Ferðin hjá ritu nr.1 á vetri 2009-2010.



Mynd 7. Ferðin hjá ritu nr.1 á vári 2010.



Mynd 8. Á myndini sæst hvar átta føroyskar ritur vóru allan desember mánað 2009. Hvør litur umboðar eina ritu, so tær hava allar verið á somu leið.